ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Flestu málini koma í seinna umfarinum

3. deild: *Heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað skálamonnum at koma á stigatalvuna*



Carl H. Høgnesen kom ikki inn í 1. deildardystinum móti vágamonnum, og hetta kom væl við hjá 3. deildarmonnunum hjá B36

Savnsmynd

Hesa ferð vórðu tjúgu mál skorað, og ein spælari fekk reyða kortið. Merkisvert er tað, at níggju av teimum tjúgu málunum vórðu skorað síðsta korterið. Tað boðar ivaleyst frá, at venjingarstøðan ikki er serliga góð – heldur ikki so tíðliga á árinum. Kanska tað fer at batna, sum tað fer at líða út á summarið, og menninir so at siga spæla seg í venjing, sum tað plagar at verða tikið til!

Skáli–AB

Niðurflytararnir frá í fjør hava tað strevið í 3. deild. Skáli hevði hesa ferð vitjan av uppflytarunum av Argjum. Tað reið meiri um snarið, enn tað gjørdi, tá teir í teimum báðum fyrstu umførunum vóru í Klaksvík og tá teir vóru í Vágum, men úrtøkan í fyrsta heimadystinum var eingin.

Argjamenn hava sum mál at blanda seg í stríðið um uppflyting. Enn er ov tíðliga at meta um, um teir hava nóg gott fólk at røkka málinum við, men sigurin á Skála var kærkomin og kann seinni í heyst í orðsins sanna týdningi fara at vísa seg at verða gull verdan.

Svenning W. Hansen, sum í yngru deildunum var í B36, skoraði sigursmálið, tá tað restaðu seks minuttir. Fróði Stenberg, sum býr á Argjum og altíð hevur spælt við AB, setti í 1. hálvleiki hol á. Miðskeiðis í 1. hálvleiki svaraði toppskjúttin hjá Skála seinastu árini, Bogi Gregersen, aftur, tá hann sendi brotsspark í kassan.

Nú er spurningurin, nær Skáli fer at koma á talvuna. Komandi sunnudag skulu teir til Vágs, og so fæst at síggja, um teir møta við so góðari manning, sum tað ber til.

KÍ–VB

Vágbingar taptu hesa ferð í Klaksvík. Vit søgdu síðst, at í 3. deild eru klaksvíkingar á heimavølli og klaksvíkingar á útivølli hvør sítt. At liðið hevur betri manning á heimavølli enn á útivølli varð aftur staðfest sunnudagin.

VB royndi at trýsta fram móti endanum, og tá tað fimm minuttir undan leikloki eydnaðist at minka um munin til 3–2, tveittu teir alt fólið fram, og so skoraði KÍ í kontraálopi.

B71–ÍF

Tað gongur striltið hjá fuglfirðingum at koma fyri seg . Næstbesta liðið í Fuglafirði hevur í fleiri av undanfarnu árunum talst millum tey ovastu. Í fjør fingu teir eins og onkra aðra ferðina í níti árunum bronsukrónur, men higartil í ár hevur úrtøkan verið soltin. Á Sandi kom ÍF á odda í 1. hálvleiki. Eftir horna smekkaði Birgir Petersen í kassan. Stutt undan steðginum javnaði unglingaspælarin Símun Hansen. Hann varð spældur leysur mitt fyri og smekkaði í málið.

Sigursmálið skoraði veteranurin Róin Clementsen, sum var komin á vøllin í 2. hálvleiki. Eftir at hann í fyrstu atløgu hevði hálybjargað, helt dómarin, at ÍF málverjin, Emil Toftegaard, gjørdi brotsspark.

TB–B68

Toftamenn hava havt ætlanir um at vera við í stríðnum um uppflyting, men higartil hava teir ikki víst uppflytingarspæl.

Arnfinn Olsen, sum hevur góð evni og ivaleyst hevði verið í nánd av besta liðnum, um hann hevði gjørt meiri við venjingina, legði á Sevmýri tvær ferðir B68 framum, men Eyðun Svalbard javnaði báðu ferðirnar.

B36–FS Vágar

At B36, sum frammanundan er umboðað bæði í 1. og 2. deild er oddalið, kann geva lægru staddu liðunum í 3. deild eyka møguleikar. Hesa ferð gekk undanvindurin hjá B36 út yvir vágaliðið.

Dánial P. Johansen og Carl H. Høgnesen høvdu sitið á beinkinum í 1. deild uttan at verða skiftir inn. Tað gekk útyvir vágaliðið, sum í 2. hálvleiki spældi við tíggju monnum. Fimm minuttir restaðu av fyrra umfarinum, tá dómarin, Tommy Jensen, vísti Birgiri Hansen reyða kortið.

JH

Úrslit

B36–FS Vágar 3–1 (1–0)
1–0: Dánial P. Johansen 22.
2–0: Jóannes Guttesen 67.
3–0: Carl H. Høgnesen 80.
3–1: Hilmar Hansen 86.

TB–B68 2–2 (0–0)
0–1: Arnfinn Olsen 55.
1–1: Eyðun Svalbard 78.
1–2: Arnfinn Olsen 84.
2–2: Eyðun Svalbard 88.

B71–ÍF 2–1 (1–1)
0–1: Birgir Petersen 32.
1–1: Símun Hansen 42.
1–2: Róin Clementsen br 73.

KÍ–VB 4–2 (1–1)
0–1: Egil Steintórsson 5.
1–1: Erling Fles 31.
2–1: Óli Joensen 70.
3–1: Jógvan Heinesen 82.
3–2: Tummas Richard 88.
4–2: Bogi Isaksen 89.

Skála–AB 1–2 (1–1)
0–1: Fróði Stenberg 20.
1–1: Bogi Gregersen br 25.
1–2: Svenning W. Hansen 84.

4. umfar, 14/5
FS Vágar–AB
B68–B71
B36–TB
ÍF–KÍ
VB–Skáli

Máltindurin

Signar Johannesen	AB	5
Dánial P. Johansen	B36	4
Aksel Johannesen	KÍ	4
Vinjard Guttesen	B36	3
Jákup Baldvinsson	ÍF	3
Just Johannesen	TB	3
Bárður Johannesen	AB	2
Fróði Stenberg	AB	2
Svend Poulsen	AB	2
Regin Arge	B36	2
Tummas Eli Hansen	B36	2
Arnfinn Olsen	B68	2
Kristoffur Vidtfeldt	B71	2
Petur Niclasen	FS Vágar	2
Magnus Simonsen	FS Vágar	2
Bogi Gregersen	Skáli	2
Niels Gunnar Petersen	TB	2
Eyðun Svalbard	TB	2
Kári í Lágabø	VB	2
Hans A. Niclasen	VB	2
Egil Steintórsson	VB	2

Støðan, 3. deild menn

								vunnin	tapt	mál-		Heima						Úti					
		dystir	v	j	t	mál	mál	munur	stig	v	j	t	mál			v	j	t	mál		
1	B36	3	3	0	0	15	2	13	9	2	0	0	11	1		1	0	0	4	1	
2	AB	3	2	0	1	17	5	12	6	1	0	0	13	1		1	0	1	4	4	
3	B71	3	2	0	1	7	6	1	6	2	0	0	5	3		0	0	1	2	3	
4	KÍ	3	2	0	1	10	15	-5	6	2	0	0	9	2		0	0	1	1	13	
5	TB	3	1	1	1	11	11	0	4	1	1	0	10	5		0	0	1	1	6	
6	B68	3	1	1	1	7	7	0	4	1	0	1	5	5		0	1	0	2	2	
7	FS Vágar	3	1	0	2	6	8	-2	3	1	0	0	4	1		0	0	2	2	7	
8	ÍF	3	1	0	2	7	11	-4	3	1	0	0	6	1		0	0	2	1	10	
9	VB	3	1	0	2	8	14	-6	3	1	0	0	3	2		0	0	2	5	12	
10	Skála	3	0	0	3	2	11	-9	0	0	0	1	1	2		0	0	2	1	9	

Eitt pláss fram

Føroyar eru nú á 115. plássið á styrkislistanum hjá FIFA

Á altjóða styrkislistanum hjá FIFA, sum varð almannakunngjørdur í gjár, eru Føroyar á einum 115. plássi.

Hetta er eitt pláss hægri í mun til listan fyri apríl mánað.

Hinvegin er talan framvegis um afturgongd, í mun til undanfarna ár. Við árslok 1999 vórðu Føroyar nevnliga á einum 112. plássi.

Sigurin á Liktinstein, sum annars er at finna sum nummar 135, hevur sostat gjørt sítt til, at vit nú aftur eru á rættari kós.

Munurin upp til næsta landið, Libanon er nú 4 stig, meðan tað eru 6 stig niður til 116, sum er Kasakstan.

Sum vant, er besta norðurlendska landið Noreg, sum nú er nummar átta í mun til sjeynda plássið fyri einum mánaði síðani. Danmark er á 13. plássi, meðan Svøríki er nummar 14.

FIFA listin 10. mei
Plasering undanfarna ár í klombrum.

1. Brasilia (1)
2. Kekkia (2)
3. Frakland (3)
4. Spania (4)
5. Argentina (6)
6. Týskland (5)
7. Kroatia (10)
8. **Noreg (7)**
8. Mexico (8)
10. Rumenia (8)

13. Danmark (12)

16. Svøríki (16)

49. Finnland (49)

51. Ísland (48)

115. Føroyar (116)

Opin kapping á Svangaskarði

Leygardagin verður fyrsta kappingin í frælsum ítrótti á Svangaskarði í ár.

Skráin fyri kappingina er nú løgd fast. Kappast verður í greinunum 100 m, 800 m, 5000 m, kuluvarp og longdarlop hjá monnum og kvinnum.

Lagt verður fyri við 100m renning kl. 13.00. Síðani er longdarlop á skránni. Samstundis verður 5000m renningin.

Eftir longdarlop verður kúluvarp. Og eina løtu eftir 5000 m renningina verða 800 m runnir. Kappingin kemur væntandi at taka einar tveir tímar tilsamans.

Fáir favorittar

Eftirsum tilmelding er á staðnum hálvan tíma undan fyrstu kapping, er ilt at meta um, hvørjir favorittar eru til einstøku kappingarnar. Lættast er kanska at siga nakað um longru renniteinarnar hjá monnum og kvinnum. Hjá kvinnum hevur Rigmor N. Joensen havt eitt gott vár, men av tí at kappingarnar leygardagin eru so mikið stuttar, má væntast at Sunnuvá Bjarnastein fer at geva Rigmor harða kapping.

Hjá monnum er eisini nokk so opið. Guttorm Sørensen hevur longu vunnið tvær kappingar á longru teinunum í ár, men mátti heldur óvæntað lúta fyri Boga Lenvig í Flaggdagsrenningini. Samstundis er A. Marni Joensen, hóast hann ikki er í góðari venjing í løtuni, ein sterkur outsidari. Hann eigur nevniliga føroysku metini á 800 og 5.000 metra teinunum.

Í kúluvarpi hava Poul Guttesen og Heri Ziska verið hampuliga javnir higartil í ár, meðan Ingibjørg er favorittur at vinna kappingina hjá kvinnum.

Av tí at umstøðurnar eru so ringar at venja 100 m og longdarlop í Føroyum, er vónleyst at siga nakað um vánirnar fyri hesum kappingum leygardagin.



Guttorm Sørensen ætlar sær hevnd fyri tapið í flaggdagsrenningini, har Bogi Lenvig gjørdist fremstur

Kappingin leygardagin byrjar sum nevnt kl. 13.00. Tilmelding er á Svangaskarði hálvan tíma undan fyrstu kapping.

Fimleikaframsýning á Kambsdali

Sunnudagin skipar Fimleikasambandið fyri fimleikasýning, sum samstundis er ætlað at geva ymsu feløgunum nýggjan íblástur

Komandi sunnudag kl. 17 verður ein sokallað „Hugskotssýning“ í ítróttarhøllini á Kambsdali. Hetta er eitt nýtt tiltak hjá Føroya Fimleikasambandi, sum hevur til endamáls at samansjóða øll fimleikafeløg í landinum.

Læra frá hvørjum øðrum

Seks fimleikafeløg við tilsamans uml. 400 fimleikarum verða við í framsýningini sunnudagin. Luttakandi feløgini eru Fok, Ljósið, Støkk, Flog, Havnar Fimleikafelag og Klaksvíkar Fimleikafelag.

Úr FFS verður sagt, at høvuðsendamáli við hesum tiltaki er at samansjóða fimleikarar úr teimum ymisku feløgunum, og samstundis er hetta ein góður máti at geva hvørjum øðrum hugskot og íblástur til komandi fimleikaár. Tað vil so verða, at øll feløgini ikki eru á sama støði fimleikaliga, av tí at tað er ymiskt hvussu nógv ár feløgini hava á baki, og júst hetta tiltakið kann m.a. geva teimum yngru feløgunum nøkur nýggj hugskot.

Tann almenna framsýningin verður kl 17 sunnudagin, men fimleikararnir møta longu kl 13, har byrjað verður við felags upphitan, og síðan verður farið ígongd við at vísa fram fyri hvørjum øðrum.

Anelka varð hetjan

Nicolas Anelka varð stóra hetjan, tá Real Madrid fyrrakvøldið tryggjaði sær fyrsta finalusessin í UEFA Champions League

JÁKUP MØRK

Eftir 2-0 sigurin á Bayern München, hevði Real Madrid sera góð kort á hondini, tá teir týskvøldið á olympiska leikvøllinum í München skuldu spæla returdyst.

Undan dystinum vistu teir, at uppgávan hjá heimaliðnum fór at gerast enn torførari, um tað eydnaðist spaniólunum at skjóta eitt útivallarmál.

Hetta eydnaðist eisini, tá franska problembarnið, sum nú sær út til at gerast hetja, setti høvdið á bóltin miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og fekk javnvág í aftur dystin, eftir at Carsten Jancker hevði lagt týska liðið á odda tíðliga í dystinum.

Eftir hetta tóktist nærum greitt, at tað skuldi gerast spanska liðið, sum vann finalusessin, og hóast týskararnir royndu at trýsta, so eydnaðist teimum bert at fáa eitt mál afturat.

Hetta skeyt Giovanni Elber tíðliga í seinna hálvleiki, men sum kunnugt var hetta ikki nóg mikið til at venda samlaða 3-4 tapinum.

Skiftandi kappingarár

Sostatt er nú líkt til, at kappingarárið hjá 21 ára gamla Anelka hevur tikið eina merkisverda vend. Fyrst varð hann seldur til Real Madrid fyri umleið 230 mió.kr., eftir at hann hevði hótt við bæði líkum og ólíkum móti fyrrverandi felagið sínum, Arsenal, tí teir ikki vildu selja hann.

Komin til spanska felagið var aftur rok. Anelka megnaði ikki at skjóta málini, sum hann varð keyptur at skjóta, og skjótt varð pressan eftir honum. Hesum var hann als ikki áhugaður í, og segði ístaðin, at hann bert vildi spæla fótbólt, og at hann vildi hava frið til hetta (í Spania, har ítróttapressan er ein hin grammasta í heiminum).

HM kappingin fyri feløg, sum varð hildin í Brasilia í januar, sá út til gerast eydnan hjá franska leikaranum. Táverandi venjarin, John Toschak, hevði sett sær fyri, at spæla Anelka inn á liðið í hesum dystum, og hetta sá eisini út til at eydnast, inn til ein skaði aftur steðgaði honum.

Í vár varð venjarin skiftur, og tá nýggi venjarin ætlaði at laga spælið hjá Anelka til liðið, og ikki øvugt, gjørdi fransmaðurin bart og fór í verkfall. Leiðsla felagsins svaraði aftur við bót og forboði móti at venja saman við hinum leikarunum, men síðani hann aftur slapp at spæla, hevur hann rættuliga gjørt vart við seg.

Í fyrru hálvfinaluni skoraði hann leiðslumálið hjá Real Madrid, og nú tryggjaði hann felagnum finalusessin við skallara sínum.

Um hann so eisini fer at skora í finaluni og kanska EM-endaspælinum, ella um hann aftur verður ósamdur við leiðslu og venjara. Ja, tað fer tíðin so at vísa.

Sponsk finala

Seinasta hálvfinalan á hesum sinni varð leikt í gjárkvøldið millum Barcelona og Valencia, og sostatt varð týskvøldið greitt, at talan verður um eina reina spanska finalu í hesi útgávuni av Champions League. Undan hesum dystinum hevði Valencia eina 4-1 leiðslu, so tað er sannlíkt, at finalan verður ein uppgerð millum Real Madrid og Valencia.

Merkisvert er í hesum sambandi, at um so er, verður hetta annað árið á rað, at tvey lið, sum ikki eru meistarar, hittast í finaluni. Í fjør vóru tað Bayern München og Manchester United, sum bæði komu við sum tveyarar í heimligu kappingini.

Real Madrid er mest vinnandi felagið í søguni hjá europeisku kappingini fyri meistarar. Finalan í ár er 11. finalan hjá kongaliga spanska felagnum, og av teimum tíggju undanfarnu, hava teir vunnið ikki færri enn sjey.